# lum í Saltangará



*Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, ynskir leiðaranum, Niels Juul Akraberg, tillukku við nýggju hølunum*
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Arne Højgaard, sum í fleiri ár starvaðist hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, ynskir núverandi starvsfólkunum tillukku við hølunum*
Mynd: Vilmund Jacobsen

## Góð byrjan hjá Atlantic Navigator

**Tvey tey fyrstu hálini hjá risatrolaranum Atlantic Navigator hendan túrin vóru óføra góð**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta mikukvøld mynstraði manningin á Atlantic Navigator á øðrum sinni, og stevnt varð suður á Írlandsleiðina, har skipini plaga at fáa svartkjaft hesa tíðina av árinum.



*Tað sær lovandi út hjá Atlantic Navigator, nú skipið er komið á fiskileið í bestu vertíð*
Mynd: Anna V. Ellingsgaard

### Stór hál

Sosialurin hevur skilt, at tvey tey fyrstu hálini hjá skipinum hendan túrin vóru óføra góð.

Vit hava frætt, at fyrsta tóvið vardi bert í einar 45 minuttir, og tá ið teir háladu, vóru eini 190 tons av svartkjafti í.

Næsta hálið hjá skipinum var eisini óføra gott; tá fingu teir 160 tons.

Hetta bendir á, at byrjanin hjá skipi og manning hevur verið góð hendan túrin.

Á seinasta túri var Brandur Nólsoy skipari, og í samrøðu við Sosialin mikudagin, tá ið tey mynstraðu, segði hann, at útbúnaðurin umborð nú vísir seg at rigga væl.

- Nú vantar okkum bert rávøru, legði hann aftrat.

### Spenningur

Skipari hendan túrin er Lion Petersen, og hann segði eisini í samrøðu hendan dagin, at spenningurin er stórur, nú svartkjaftaskipini koma út í bestu vertíð.

Í mun til Næraberg, hevur Atlantic Navigator eina nógv størri framleiðsluorku, og nú útbúnaðurin vísir seg at rigga, sum hann skal, er spenningurin stórur.

Veðrið spælir nógv inn, hvussu svartkjaftafiskiskapurin roynist, men alt bendir í hvussu er á, at Atlantic Navigator hendan túrin hevur fingið eina lovandi byrjan.

# P/F Eysturoy sær ljóst upp á línuveiðina

**- Vit leggja okkum eftir at hava so góðan fisk sum gjørligt, og tað gevur ein betri prís á marknaðinum, sigur Jóhannes Olsen, sum nú rekur trý línuskip, Eysturoying, Sigmund og Morgunstjørnuna**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur felagið, P/F Eysturoy á Toftum, keypt tríggjar línubátar. Av hesum varð seinasti báturin, sum var Morgunstjørnan, keyptur um árskiftið.

Felagið keypti fyrst Eysturoying og síðan Sigmund fyri stívliga tveimum árum síðan.

Tað er Jóhannes Olsen, sum eigur 2/3 í felagnum, P/F Eysturoy, meðan P/F Snodd eigur seinasta triðingin.

Á skrivstovuni hjá P/F Eysturoy, sum leigar hølir í bygninginum hjá P/F Snodd, eru reiðarin sjálvur og Sanna Solmunde, skrivstovukvinna.

Jóhannes tekur sær av søluni av fiskinum, sum línuskipini veiða, og í hesum sambandi hevur hann neyvt samstarv við Fiskamarknað Føroya.

P/F Snodd hevur eisini havt landing, skiljing og pakking av fiski í bygninginum á havnalagnum, men í dag er tað felagið, Sp/f Rainbow Seafood, ið leigar høli og maskinur til skiljing og pakking av fiski, sum felagið keypir.

### Gongur hampiligt

Jóhannes Olsen sigur, at raksturin hjá línuskipunum hevur gingið hampiliga væl, og hann sigur seg trúgva upp á, at henda vinna eigur eina framtíð.

- Vit leggja okkum eftir at hava so góðan fisk sum gjørligt, og tað gevur ein betri prís á marknaðinum.

Umborð á hvørjum av línubátunum hjá felagnum eru 14 mans.

- Vit hava bert hesar tríggjar manningarnar, men tað er vanligt, at einir 2-3 mans eru tøkir til avloysing til hvørt av hesum skipum, soleiðis at fasta manningin fær frítúrar eftir tørvi, sigur hann.

Sosialurin fer seinni í vikuni at skifta orð við Jóhannes Olsen um aðrar ætlanir, sum felagið hevur.




*Sigmundur er eitt av teimum trimum línuskipunum, sum P/F Eysturoy nú eigur*
Mynd: Vilmund Jacobsen




*Úr hesum bygningi á havnalagnum á Toftum rekur Jóhannes Olsen sítt reiðaravirksemi*
Mynd: Vilmund Jacobsen